Í stuttum

Lagt til rættis: Eyðun Klakstein



# Írland sendir dukku til Grand Prixið

Tað verður ein dukka, sum skal umboða Írland í europeiska Tónleika Grand Prixnum. Um vikuskiftið var írska Grand Prixið, og vinnarin gjørdist Dustin, sum er ein væl kend dukka úr eini sjónvarpsrøð. Dustin er kendur fyri at brúka seg, og hann er væl umtóktur millum írar. Nú skal hann so eisini umboða Írland í Grand Prixnum við sanginum Irande Douze Pointe. Írskir fjølmiðlar ivast í, um tað er populariteturin hjá Dustin, sum hevur sent hann í europeisku finaluna, ella um fólk við hesum vilja mótmæla vánaligu úrslitini hjá Írlandi seinastu árini.

# Roykja minni – men eta ósunt

**Rockbólkurin Led Zeppelin gjørdi í fjør comeback við eini serligari konsert í London, og tað er líkt til, at rockbólkurin verður aftur at hoyra á palli í næstum. Led Zeppelin verður eftir øllum at døma við á eini stuttari konsertferð saman Matallica, Pearl Jam og Kanye West. Konsertferðir í USA varðar í tríggjar dagar og kallast Bonnaroo Arts and Music Festival. Harafturat er møguleiki fyri, at Led Zeppelin fer á eina longri konsertferð móti endanum av hesum árinum.**





# Meira Bourne

Líkt er til, at filmsrøðin um Jason Bourne heldur fram. Tríggir filmar eru gjørdir um Bourne, og teir hava verið sera væl umtóktir kring heimin. Tað er Matt Damon sum spælir Jason Bourne, og hann skal eisini verða við í fjórða filminum, sum væntandi skal framleiðast í 2009 ella 2010. Matt Damon hevur sagt, at hann vil gjarna spæla við í fjórða filminum, um leikstjórin Paul Greengrass heldur fram. Greengrass hevur eisini sagt, at hann vil halda fram, um Damon heldur fram, so endin á tí verður uttan iva ein nýggjur spenningsfilmur um Jason Bourne.

# Tivoli bjóðar konsertir

Aftur í ár fer Tivoli í Keypmannahavn at bjóða stórar popp og rockkonsertir fríggjakvøld. Fredagsrock kallast konsertirnar, sum seinastu árini hava savnað sera nógv fólk í Tivoli. Millum tey, sum skulu spæla í Tivoli í ár, eru Anne Linnet, Gnags, Shu-bi-dua, Alphabeat, Tue West og Blue Foundation. Fyrsta konsertin verður 30. Mai, og tann seinasta verður 5. september.



# Google stendur sterkt

Google er sterkasta merki – ella brandið – í Bretlandi. Tað vísir ein kanning hjá stovninum Superbrands. Seinastu árini hevur Microsoft annars ligið ovast á listanum, men nú er Google lopið fram um øll hini kendu merkini. Listin hjá Superbrands verður gjørdur við atliti til góðsku, trúvirði og útbreiðslu millum fólk. Microsoft er nú nummar 2, og BBC er á triðja plássi.

Sosialurin